# Jólahugni í januar



*Systrarnar, Astrid (t.h.) og Mása Tróndheim, sungu jólasálmar fyri teimum eldru*

**Leygardagin var jólahugni fyri pensjónistar í Tekniska Skúla í Klaksvík. Tað eru heimahjálpirnar, sum hvørt ár skipa fyri hesi hugnaløtu, sum er hvønn fyrsta leygardag í januar**

HUGNALØTA
*Orð og myndir: Rúna Sivertsen*

Hvørt ár, beint eftir nýár, skipa heimahjálparar í Norðoyggjum fyri jólahugna fyri pensjónistar. Um 70 fólk vóru samankomin í kantinuni í Tekniska Skúla í Klaksvík, har borðreitt verður við smurdum breyði, te, kaffi og køkum.

Í ár var tað Steinbjørn Jacobsen, sum las jólaboðskapin, og Hans Eiler Hammer las eina søgu. Mása og Astrid Tróndheim sungu jólasangir, og pápi teirra Gerhard hevði klaverfylgispælið.

Poli Mikkelsen og Erland Jacobsen, gleddu tey eldru við sínum lætta og vakra harmonikuspæli.

Seinni var orðið frítt, og Anna Nielsen og Jógvan Gerðalíð nýttu høvið at siga nøkur orð.

Heimahjálpirnar høvdu keypt jólagávur, og øll fingu hvør sín pakka, eisini tey, sum vóru við teimum eldru, ið ikki vóru før fyri at koma einsamøll.

Tekniski Skúli hevur hvørt ár latið hølið ókeypis til hetta endamál, og kommunan stuðlar tiltakinum við peningi.

Alt arbeiðið verður gjørt ókeypis. Heimahjálpirnar standa fyri øllum og smyrja sjálvar breyðið og baka køkurnar.

Sjálvsagt var felagssangur eisini á skránni og sangblað prentað við stórum stavum, so lætt var hjá teimum gomlu at fylgja við.

Løtan endaði við, at øll í felag sungu," Nú dagurin at enda er".

Tað var Elinborg Thomasen, eftirlitiskvinna, sum í ár samskipaði hesa stak væl eydnaðu løtu.



*Herluf í Ánunum heilsar Tummas Wilhelm. - Eg verði 90 ár næstu ferð, eg fylli, sigur Herluf*



*Tey eldru hugnaðu sær óført á hugnaløtuni í Tekniska skúla í Klaksvík leygardagin. Fremst á myndini, Jógvan Fróðin Hansen og konan, Andrea*



*Pætur Franklin Sørensen og Hjalmar Waag Høgnesen heilsast yvir borðið. Fremst á myndini sæst Pól Jóhannus Poulsen*



# Mótmæla bygging av bústaði til minnisveik



*Tveir av grannunum hjá nýggja bústaðnum til minnisveik, ið Tórshavnar Býráð byggir við Torfinsgøtu í Havn, Ingolf Rasmussen og Mortan Johannesen, handa her Jan Christiansen mótmæli frá grannalagnum. Grannarnir mótmæla, at bygningurin verður nógv hægri enn upprunaliga ætlanin, og tí fer at taka útsýni frá grannunum.*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Tórshavnar Býráð er í holt við at byggja eitt heim til minnisveik í Torfinsgøtu í Havn. Men grannar mótmæla byggingini og vísa á, at býráðið ikki hevur hildið avtalur um at húsini ikki skulu byggjast ov høgt, so tey taka útsýni frá grannunum. Týsmorgunum handaðu tey Jan Christiansen undirskriftir, har tey mótmæla arbeiðsháttinum hjá býráðnum**

MÓTMÆLI
*Jón Brian Hvidtfeldt*

– Minnisveik eru vælkomin at búgva í okkara grannalagi, hvør veit, kanska enda vit har sjálvi einaferð.

Soleiðis byrjar eitt mótmælisskriv frá grannalagnum í Torfinsgøtu í Havn, ið týsmorgunin varð handað Jan Christiansen, borgarstjóra, saman við umleið 60 undirskriftum.

Grannarnir mótmæla, at húsini til tey minnisveiku fara at taka útsýni frá grannunum, umframt at tey halda at býráðið hevur skúgvað reglur um fríøki og bygging annars til viks, tá húsini skuldu byggjast. Grannarnir vísa á, at upprunaliga fingu tey at vita, at talan var um ein bygning í einari hædd, sum skuldi setast í eina lægd, sum er beint eystanfyri Torfinsgøtu. Men seinni skuldi tað vísa seg, at byráðið fyrst valdi at fylla grót í lagdina, og síðan byggja ein bygning við høgari reising.

– Tað fer at føra við sær, at grannarnir omanfyri og við síðuna av missa útsýnið, og fyri tey, sum búgva niðanfyri, verður tað sum at búgva undir einum forbergi, skriva grannarnir í mótmælisskrivinum til býráðið.

Tey fílast á sera vánaligu kunningina frá býráðnum, og vísa á, at tey einki hava fingið at vita um broyttu ætlaninar hjá býráðnum.

## Økið er fríøki

Grannarnir vísa harumframt á, at heimið verður bygd á eitt øki, sum býráðið sjálvt gjørdi til fríøki fyri umleið 30 árum síðani.

– Men nú hevur býráðið kúvent og uttan fyrilit fyri fríøkinum verður ein høgur bygningur settur á henda grøna blettin í Havnini, skriva grannarnir í mótmælinum, og vísa samtíðis á, at teir halda fast um, at byggingin hvørki er í samsvar við byggisamtyktina ella tað, sum býráðið annars hevur upplýst grannunum.

## Skilir atfinningarnar

Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, sigur seg skilja at grannarnir vilja varðveita grøna blettin, og at teir í aðru atløgu vilja varðveita so nógv sum gjørligt av útsýninum.

– Men býráðið er í tí støðu, at vit vilja gera nakað fyri eldraøkið og tey minnisveiku, og tí hava vit valt at byggja eitt heim til teirra, sigur Jan Christiansen.

Borgarstjórin heldur tó fast við, at øll byggingin er gjørd í tráð við upprunaligu ætlanina. Hann vísir á, at býráðið fyri langari tíð síðan samtykti at byggjast skuldi eitt heim til minnisveik í hesum økinum, og at kunnað hevur verið væl og virðiliga um málið, umframt at tekningar hava ligið frammi. Jan Christiansen leggur tó afturat, at nú byggingin er í gongd, sær tað ógvusligari út enn á tekningini, men hann sigur seg tó vera vissan í, at tá bygningurin er liðugur, fer hann at fella væl inn í grannalagið.

## Byggingin neyvan steðgað

Jan Christiansen sigur, at í fyrstu atløgu fer hann at kunna restina av býráðnum um mótmælisskrivið frá grannunum í Torfinsgøtu. Men hann dugur tó illa at ímynda sær, at byggingin verður broytt ella steðgað.

Jan Christiansen vísir á, at byggingin er boðin út sum totalenterprisa, og tí kann tað koma at kosta dýrt, um ætlanin nú verður broytt. Bygningurin, ið verður bygdur í tveimum eindum, og sum hevur pláss fyri tilsamans 16 minnisveikum, verður eftir ætlan liðugur í heyst. Byggingin er mett at kosta umleið 16 milliónir krónur, harav landið rindar helvtina.

# Hópneyðtøkumálið móti føroyskari kvinnu byrjað

**Mánadagin byrjaði rættarmálið í býrættinum í Keypmannahavn móti fimm dønum, ið eru ákærdir fyri at hava neyðtikið og havt annað kynsligt samband við eina unga, føroyska kvinnu. Menninir játta at hava verið saman við kvinnuni kynsliga, men avsanna at talan var um neyðtøku**

RÆTTARMÁL
*Jón Brian Hvidtfeldt*

Býrætturin í Keypmannahavn skal í næstu viku taka støðu til, hvørt talan var um neyðtøku, tá ein føroysk kvinna í tjúgunum tann 8. desember í 2001 hevði kynsligt samband við fimm mans í einum garði í Hillerødsgade í Keypmannahavn.

Teir fimm menninir eru allir ákærdir fyri neyðtøku og fyri at hava havt annað kynsligt samband við kvinnuna um hálvgum trý tíðina henda vetrarmorgun fyri góðum ári síðan. Tá menninir mánadagin vóru avhoyrdir í býrættinum í Keypmannahavn, játtaðu allir menninir at hava havt kynsligt samband við føroysku kvinnuna, men hildu fast við, at kvinnan sjálv legði upp til teirra.

Umframt hesar fimm menninar eru seks aðrir mans skuldsettir í málinum. Men eitt møguligt rættarmál móti teimum skal bíða, til hetta málið er avgreitt. Ákærin, Janne Mortensen, sigur við donsk bløð, at hon metir, at fleiri enn teir fimm kunnu hava verið við til at misnýta føroysku kvinnuna ella í øllum føri hava verið hjástaddir, tá hendingin fór fram, uttan at hjálpa kvinnuni.

Tá ákærin í fyrstu atløgu hevur valt at ákæra júst fimm mans, er tað tí at hesir longu nú hava játtað at hava havt kynsligt samband við kvinnuna. Eisini eru DNA-spor frá fýra teirra funnin á kvinnuni, vísti ákærin á.

## Dómur í næstu viku

Teir ákærdu, ið arbeiða í sum hondverkarar, vóru saman við starvsfeløgum hetta kvøldið til jólafrokost í einum veitsluhølum í Hillerødsgade. Í býrættinum kom fram, at menninir høvdu fingið ríkiligt at drekka, umframt at onnur rúsevni vóru at fáa í veitsluni. Harumframt høvdu menninir fingið stripparar at undirhalda. Tá líður nakað út á náttina fara fleiri av monnunum útum at fáa sær fríska luft, og tá kemur føroyska kvinnan, ið hevði verið til ein annan jólafrokost í býnum, framvið.

Hvat síðan hendi skal býrætturin í Keypmannahavn taka støðu til. Rættarmálið fer at taka fleiri dagar, tí nógvir persónar skulu avhoyrast í málinum. Týsdagin skuldi føroyska kvinnan avhoyrast í málinum fyri dupultum afturlatnum hurðum. Væntandi verður dómur sagdur í málinum í næstu viku.